## Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
## Bygdarráðsfundur tann 23. novembur 2023, kl. 17.00

**Bygdarráðslimir á fundi:** Bjørg á Rógvi, Sára Jógvansdóttir, Eyðun Hansen, Laila Haldansen, Anja Haldansen, Ingi Olsen og John Zachariassen
**Skrivari:** Rúna Ingunardóttir

---

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri boðaði Pauli T. Petersen tann 17. novembur 2023 frá, at honum barst frá at møta á fundinum.
1. tiltakslimur John Zachariassen fekk fundarboð tann 17. novembur 2023 og játtaði at møta.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 231**
Stuðulspolitikkur
J.nr.: 1002-3-2022

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 15. novembur 2023 uppskot um stuðulspolitikk fyri Vestmanna kommunu.

Treytir sum verða lagdar aftrat eru hesar:

- § 9. Stuðulin er treytaður av at ein roknskapur verður gjørdur fyri tiltakið. Um fortreytirnar fyri eini játtan broytast munandi, kann kommunan gera av ikki at útgjalda játtaðan stuðul.
- § 13. Stuðulin verður útgoldin, eftir at verkætlanin er framd, um ikki onnur avtala er gjørd.

Nevndin mælir til at samtykkja uppskotið við broytingum dagf. 15. novembur 2023.

**Viðv. 231**
Bjørg á Rógvi, borgarstjóri, skeyt upp, at grein 9: Stuðulin er treytaður av *"at ein roknskapur verður gjørdur fyri tiltakið"* verður skift út við *"at fíggjarætlan fyri verkætlanina skal viðfestast"*.

Uppskotið hjá Bjørg á Rógvi, borgarstjóra varð einmælt samtykt.

**Mál 232**
Reglugerð fyri flogfenaðhald
J.nr.: 900002-1-2023

Trivnaðar- og Umhvørvisnevndin viðgjørdi á fundi 13. novembur 2023 viðmerkingar frá Umhvørvisstovuni, dagf. 10. novembur 2023, til Reglugerð fyri flogfenaðhald.

Nevndin mælir til at samtykkja uppskotið við broytingum frá Umhvørvisstovuni.

**Viðv. 232**
Tilmælið hjá Trivnaðar- og Umhvørvisnevndin varð einmælt samtykt

**Mál 233**
Val av umboð til Tilbúgvingarnevndina
J.nr.: 22042-1-2020

Í telduposti frá Tóka Seloy, brunaumsjónarmanni, dagf. 8. novembur 2023, ynskir Helgi Finn Poulsen at taka seg úr Tilbúgvingarnevndini.

Vestmanna Sløkkilið skeyt upp at velja Høgna Johansen í Tilbúgvingarnevndina.

**Viðv. 233**
Ingi Olsen skeyt upp at bygdarráðið broytir limatalið frá 6 limir til 5 limir í komandi setu og at samtykkja uppskotið frá Vestmanna Sløkkilið.

Uppskotið hjá Inga Olsen varð einmælt samtykt.

Bjørg á Rógvi, borgarstjóri fór av fundinum vegna ógegni.

**Mál 234**
Umsókn um Marknaumskipan ímillum ogn matr. nr. 106a og matr. nr. 103
J.nr.: 104002-5-2023

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi tann 14. novembur 2023 umsókn frá Leivur á Rógvi um marknaumskipan ímillum ogn hansara matr. nr. 106a og matr. nr. 103 hjá Dánjal Jákup Andreasen.

Nevndin mælir til at viðmæla umsóknini.

**Viðv. 234**
Tilmælið hjá Teknisku Nevnd varð einmælt samtykt

Bjørg á Rógvi, borgarstjóri varð aftur á fundinum

**Mál 235**
Uppskot um serstaka byggisamtykt fyri pumpuverk í Heygadali og á Mýrunum
J.nr.: 102002-5-2023

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi tann 14. novembur 2023 uppskot um serstaka byggisamtykt fyri pumpuverk í Heygadali og á Mýrunum.

Nevndin mælir til at samtykkja uppskotið til serstaka byggisamtykt.

**Viðv. 235**
John Zachariassen skeyt upp at gera eitt økið fyri alla serstøku byggisamtyktina, sum eitur J2. Uppskotið hjá John Zachariassen varð einmælt samtykt.

Tilmælið hjá Teknisku Nevndin varð einmælt samtykt við broytingaruppskotinum hjá John Zachariassen.

**Mál 236**
Umsókn um 6 loftslyftir til Grønanes
J.nr.: 8301042-1-2023

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 15. novembur 2023 umsókn um seks loftslyftir til heimið á Grønanesi.

Í telduposti dagf. 8. august 2023 sendi Niels A. Joensen, leiðari í VEKS, umsókn um at fáa eina íløgu í 6 loftslyftir til búrúm á Heiminum á Grønanesi í inniverandi fíggjarári.

Nevndin mælti til at samtykkja eykajáttan á kr. 100.000 til tvær loftslyftir, fíggjað av endurskoðaðu fíggjarætlanini fyri 2023.

**Viðv. 236**
Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.

**Mál 237**
Endurskoðað fíggjarætlan fyri 2023 til 1. viðgerð
J.nr.: 30102-1-2022

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 15. novembur 2023 endurskoðaða fíggjarætlan fyri 2023.
Nevndin mælir til at endurskoðaða fíggjarætlanini fyri 2023 verður løgd fram til 1. viðgerð.

**Viðv. 237**
Endurskoðað fíggjarætlan fyri 2023 varð lagd fram og einmælt samtykt við 1. viðgerð

**Mál 238**
Fíggjarætlan fyri 2024 til 2. viðgerð
J.nr.: 30102-1-2023

Sambært stýrisskipan fyri Vestmanna Bygdarráð §13 skal uppskot til fíggjarætlan leggjast fyri bygdarráðið áðrenn 1. oktobur.

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 23. august 2023 fíggjarætlan fyri Vestmanna kommunu fyri 2024. Fíggjarnevndin samtykti einmælt at leggja fíggjarætlan 2024 fram.

**Vestmanna Bygdarráð** viðgjørdi á fundi tann 28. septembur 2023 fíggjarætlan fyri Vestmanna kommunu fyri 2024. Uppskotið til fíggjarætlan fyri Vestmanna kommunu fyri 2024 varð lagt fram.

**Vestmanna Bygdarráð** samtykti einmælt fíggjarætlanina fyri 2024 við 1. viðgerð tann 26. oktobur 2023.

**Fíggjarnevndin** viðgjørdi á fundi tann 15. novembur 2023 fíggjarætlan fyri Vestmanna kommunu fyri 2024.

Fíggjarnevndin mælir til, at umsitingin kannar kostnaðaravleiðingar av prosjektering til Vestmanna Skúla og spillivatnsætlan í mun til breiðkan av Niðara Vegi til komandi bygdarráðsfund.

Nevndin samtykti at leggja uppskotið til 2. viðgerð íroknað barnafrádrátti, kommunuskattaprosent og barnaansingargjald v.m.

**Viðv. 238**

Fíggjarnevndin skeyt upp at broyta barnafrádráttin til kr. 5.500 og kommunuskattaprosentið til 21,15 %.

Fíggjarætlanin fyri 2024 varð einmælt samtykt við 2. viðgerð.

Bókin lisin. Fundur lokin kl. 19:20

Sign.:

Bjørg á Rógvi Sára Jógvansdóttir Eyðun Hansen Laila Haldansen

Anja Haldansen Ingi Olsen John Zachariassen